Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo



TÆNARANÆMINGUR

Hotel Hafnia sóknast eftir tænaranæmingi at byrja í mars.

Tú ert...
» Tænastuhuga/ur
» Fyrikomandi
» Álítandi
» Samstarvsfús/ur
» Áhuga/ur fyri at læra

Tú lærir...
» At veita tænastu á altjóða støði
» Kunnleika um mat & vín
» Roknskap
» Teldukunnleika

Tú fært...
» Læruppláss á eini av Føroya bestu matstovum
» Ein áhugaverdan og avbjóðandi arbeiðsdag
» Góðar arbeiðsumstøður
» Skiftistíð

Lærutíðin er 3 ár og 4 mánaðir – tað er ein fyrimunur um tú hevur »jord til bord« skúlagongd á 20 vikur.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Peter Hentze.

Umsókn, við avriti av prógvum og ummælum, skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 15. februar 2006

**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.




Hotel Hafnia ★★★★
Hotellið í miðbýnum



*Rúna Sivertsen, formaður í Ferðslutrygd, Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í ferðslumálum*

# – Øll eiga

**- Eg vóni inniliga, at so nógv sum gjørligt av teimum, ið taka avgerðir um ferðsluna í Føroyum, nýta høvið og koma til ráðstevnuna, sigur Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

**RÁÐSTEVNA**
*Magnus Gunnarsson*

norden




YGGDRASIL 25 ÁR
Jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum
Sunnudagin 15. januar 2006 kl. 16.00

Eivør Pálsdóttir
Annika Johannesen
Tore Brunborg • Mia Káradóttir
Heðin Ziska Davidsen • Kristian Blak
Anders Jormin • Brandur Jacobsen

15. januar er føðingardagur hjá Williami Heinesen, sum hevði stóra ávirkan á tónleikin hjá Yggdrasil tey fyrstu árini. Verkið DEN YDERSTE Ø – sum eisini verður framført hetta kvøldið, er tónleikur við recitation av yrkingum eftir Williami Heinesen.

Atgongumerkið til konsertina er ein fløga við upprunaútgávuni við Den Yderste Ø frá 1981. Atgongumerkið til konsertina kostar 125,- íroknað fløguna, og fæst í húsinum.

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Norðari Ringvegur • 100 Tórshavn • Tlf. 317900 • Fax 319790 • www.nlh.fo

Hegnisfólk til verkstaðið

Til verkstað okkara, sóknast vit eftir einum dugnaligum handverkara við teldukunnleika til alt fyrifallandi arbeiði í sambandi við skeltaframleiðslu, bildekorering og básabygging.

Arbeiðsuppgávurnar eru bæði nógvar og fjølbroyttar og til nakrar krevst, at tú ikki ræðist hæddir og at ryggurin er góður.

Tað er ikki nakað beinleiðis krav, at tú hevur handverkligt prógv, men vit vænta, gott handalag og at evnini eisini røkka tvørtur um fakmørk.

Vit leggja stóran dent á, at tann ið settur verður, hevur koyrikort, er nærlagdur og fram um alt álítandi. Arbeiðstíðin er vanliga 40 tímar um vikuna, men úrtíðararbeiði kemur fyri. Starvið verður lønt eftir sáttmála.

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Tórð Patursson á tlf. 358025.

Umsókn til starvið skal sendast til:

**Team85**
**Att.: Hjalgrim Samuelsen**
**J. H. Schrøtersgøta 11**
**100 Tórshavn**

TEAM85
REKLAMUVIRKI

